# Oddagrein

**Eyðun Klakstein**
*eydun@sosialurin.fo*



# TANN VAKRI FÓTBÓLTURIN VANN

Heimsins størsta ítróttarkapping gongur móti endanum. Heimsmeistaraskapið í fótbólti verður hildið í Suðurafrika, og um vikuskiftið skulu tey bestu í kappingini finnast. Farna mánaðin hava milliónir og aftur milliónir av fólki kring allan heimin fylgt við dystunum, sum hava verið spældir har suðuri á jarðarklótuni. Tað hevur verið drama fyri allar pengarnar – og fótbóltsligt undirhald fyri vekslipengarnar.

Tað eru nógvir vinnarar og taparar í eini slíkari kapping. Ein vinnari er landið Suðurafrika, sum hevur verið so nógv ígjøgnum, men fekk møguleikan at hýsa kappingini, og sum hevur lyft hesa uppgávu væl og virðilig. Europearar hava hildið fyri oyruni, tí afrikanarar blása í horn, tá ið teir hyggja eftir fótbólti, men tað hevur ikki nervað meira enn óneyðugt, og eftir at fleiri sjónvarpsrásir funnu fram snildir at dempa ljóðið av vuvuzelunum, hevur sjónvarpsfótbólturin ljóðað sum vanligt. Hetta er ikki tað besta fótbóltsliga endaspælið, sum hevur verið. Nógv av londunum spældu so varisligan og verjukendan fótbólt, at tað oyðilegði dystirnar og undirhaldið. Og so vóru tað tey stóru londini, sum vildu so nógv, men megnaðu so lítið. Fraklendingar gjørdu sær fyri skommum, eingilsmenninir vórðu útstillaðir, og italiumenn niðurspældu seg sjálvar.

Nú tey fýrsta bestu standa eftir og skulu spæla avgerandi dystirnar, er tað at fegnast um, at hetta eru lond, sum hava staðið fyri tí positiva fótbóltinum í hesi kappingini. Týski maskinfótbólturin er dagførdur, teir úr Uruguay hava spælt nakrar sera undirhaldandi og dramatiskar dystir, niðurlendingarnar eru framvegis góð umboð fyri totalfótbóltin, og so eru tað teir fantastisku spaniólarnir, sum spæla besta fótbóltin í heiminum í løtuni.

Sunnukvøldið verður heimsmeistarin funnin, og tað verður eitt land, sum ikki hevur roynt hetta áður, og hvat hava Spania og Holland ikki uppiborið hendan heiðurin. Bæði um vit hugsa søguliga og um júst hesa kappingina. Líkamikið, hvør vinnur finaluna, fáa vit ein verdugan heimsmeistara, sum umboðar tann álopssinnnaða og positiva fótbóltin. Og tað er at fegnast um, at londini við tí vakra fótbóltinum standa eftir sum stóru sigursharrarnir í einum smákeðiligum endaspæli.



**» Londini við tí vakra fótbóltinum standa eftir sum stóru sigursharrarnir**



# Útgáva til minnist um deyð fólk

Mánadagin geva Elin Brimheim Heinesen og Ad Libitum út eina fløgu, sum tey kalla »Yndisløg – ein ferð aftur í farnar tíðir«. Á fløguni eru 15 løg, har av tey flestu eru góðir, gamlir evergreens, sum nú eru týddir til føroyskt.

Løgini eru fyrst og fremst yndisløg hjá Maud Heinesen, mammu Elina, og Svenn Brimheim, mammubeiggja Elina.

Fløgan er útgivin við tí fyri eyga at vera minnisvarði yvir hesi bæði systkini, sum bæði doyðu av krabbameini ávikavist í 2005 og 2006 – umframt til æru fyri øll tey, sum eisini eru farin orsaka av herviligu krabbasjúkuni. Útgávan stuðlar eisini arbeiðnum hjá Krabbameinsfelagnum, sum fær 20 krónur av hvørjari seldari fløgu.

– Eg hevði avgjørt ikki roknað við, at tað fór at taka trý – so langdrigin – ár, áðrenn vit fingu øll rættindi, sum vit skuldu hava, fyri at kunna geva løgini út í føroyskaðari útgávu, sigur Elin Brimheim Heinesen.

Eg havi ilt við at lýsa við orðum, hvussu glað eg eri fyri, at tað nú endiliga er eydnast at veruliggera hesa fløgu, sigur hon.

Elin og Ad Libitum hava útgávukonsert í Sjónleikarhúsinum í Havn mánakvøldið kl. 20.00



**» Djórapínsla á markinum til sadismu**

GREIN Á SÍÐU 6



**» Ópopulerar avgerðir mugu eisini takast**

JÓGVAN SKORHEIM
HALLÓ Á SÍÐU 47

# Noma róst til skýggja

Viðurkenda amerikanska blaðið New York Times brúkar stór orð um matstovuna Noma í Keypmannahavn, sum herfyri varð vald til heimsins bestu matstovu. Noma brúkar norðurlendskar rávørur, og eisini føroyskar rávørur hava verið brúktar í matgerðini har.

Gastronomiski reportarin Frank Bruni hevur fylgt arbeiðnum hjá René Dedzepi, sum leiðir Noma matstovuna, og hann er hugtikin av kokkinum, sum leitar eftir rávørum úti í náttúruni.

– Noma er ein altjóða sensatión, skrivar New York Times í umrøðuni av matstovuni.

Blaðið heldur eisini, at tað er eitt sera gott hugskot at brúka rávørur, sum verða funnar í náttúruni.

– Hetta ljóðar kanska eitt sindur botaniskt og keðiligt, men tað er tað als ikki, skrivar New York Times.

Noma brúkti meira av føroyskum rávørum fyrstu tíðina, tá matstovan lat upp, enn matstovan hevur gjørt seinastu tíðina, men kokkurin René Dedzepi vil fegin hava føroyingar at lata matstovuni rávørur, sum kunnu brúkast í matgerðini.



**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*